**10 TING** UM

# Kjell Inge Røkke

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Røkke er **orðblindur**

**KJELL INGE RØKKE** ER VÍÐAGITIN SUM VINNULÍVSMAÐUR, VERÐUR ROKNAÐUR SUM EIN TANN **RÍKASTI MAÐURIN Í NOREGI**, OG HANN HEVUR BÆÐI SIGLT SAMAN VIÐ FØROYINGUM OG VERIÐ VIRKIN Í FØROYSKARI FISKIVINNU

**1** Kjell Inge Røkke varð føddur í Molde í 1958, og mánadagin kann hann halda sín 51 ára føðingardag

**2** Hann telist millum ríkastu menn í Noregi, men verður ikki longur roknaður sum tann ríkasti. Ognin hjá Røkke er júst gjørd upp til 8,2 milliardir krónur, og í fjør skuldi hann av við góðar 65 milliónir í skatti.

**3** Røkke hevur verið nógv blandaður upp í fótbólt, og mett verður, at hann hevur brúkt einar 400 milliónir norskar krónur til felagið Molde. Eitt skifti átti Røkke í enska fótbóltsfelagnum Wimbledon Football Club.

**4** Røkke fór at sigla sum 18 ára gamal, og hann hevur onga hægri útbúgving. Sum ungur sigldi hann saman við fleiri føroyingum.

**5** Í 2005 sat Røkke í fongsli í 25 dagar, eftir at hann varð funnin sekur í korruptión í sambandi við loyvi til eitt skip. Dómurin var annars 120 dagar.

**6** Í 2005 fekk Røkke næstan ein triðing av atkvøðunum, tá ið Dagens Næringsliv valdi ársins toppleiðara

**7** **Røkke er orðblindur, og hann heldur sjálvur, at tað hevur hjálpt at koma so langt, sum hann er komin sum vinnulívsmaður.**

**8** Kjell Inge býr í Skøyen í Oslo

**9** Í 1982 fór Røkke undir sítt vinnulísvirksemi í USA, og bygdi upp sítt imperium gjøgnum eitt felag í Seattle.

**10** Á einum lista hjá tíðarritinum Forbes fyri 2009 var Røkke roknaður sum tann 468. ríkasti persóinurin í heiminum.

## SITAT



Tað var gott, at vit fingu tað betur, men tað hevði verið betur, um vit fingu tað gott.

***Villy Sørensen***
*danskur heimspekingur*

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Tórnroos

## MIÐLARNIR OG EG



í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.

MIÐLAFRØÐINGURIN **BIRGIR KRUSE** HEVUR NÓGVAR MEININGAR UM HVAT EIN SKAL BRÚKA SÍNA MIÐLATÍÐ UPPÁ.

**DAG- OG VIKUBLØÐ**
Lesi Sosialin og Dimmalætting á netinum, mest sum aldri í blaðformi.

**HEIMASÍÐUR**
Eg eri alla tíðina á flestu føroysku portalum og heimasíðum. Havi Google sum startsíðu og brúki onkrar dagar nógva tíð at skriva í mín egna blogg.

**TÓNLEIKUR**



Beint nú lurti eg eftir nýggju fløguni hjá Halli Joensen og fegnist um teir sangir, sum føroyingar hava skrivað til hansara, serliga Jákup Zachariasen og Niklas Johannesen. Teir duga ein altjóða popp-formul, sum bara riggar á plátu. Onnur Symfoni hjá Gustav Mahler liggur aldri langt burtur.

**DVD**
Eg hyggi nógv í sjónvarp, bara onkutíð í DVD. Tími ikki at keypa DVD filmar, men havi onkuntíð lánt DVD á Býarbókasavninum. Síðsta góða DVD uppliving var stuttfilmurin 'Passasjeren' eftir Sakaris Stóra úr Skopun. Stór filmslist í 9 minuttir. Síðsta stóra spælifilmsupplivingin í sjónvarpi var 'El Orfanato' (Barnaheimið) á Canal+. Má eisini nevna at eg sá 'Antichrist' hjá Lars von Trier í filmklubbanum í Kringvarpinum hóskvøldið í farnu viku. Gott tiltak og sterk enduruppliving.

**MAGASIN**
Eg haldi einki magasin ella blað í løtuni. Fyrr helt eg Weekendavisen, Rolling Stone, Vox og fleiri filmsbløð, men blaðmarknaðurin er fyri mítt viðkomandi fluttur út á netið. Men magasin-sendingarnar í sjónvarpinum eru fínar. Serliga hin seinasta um Sterkan veikleika. Heimligt og nærverandi.



**SJÓNVARPSRØÐ**
Plagdi at hyggja at danskari satiru sum 'Flemmings helte', men í løtuni er eingin. Kanska er tað tí eg eri dottin inn á 'Big Love' á Canal+ og 'Lærkevej' á TV2. Hugvekjandi gerandisdrama. Kundi hugsað mær tað sama í Kringvarpinum!

**BØKUR**
Eg lesi javnt nógv ymiskt, men aldrin eina heila bók. Lesi fyrst og fremst klassiskar, danskar yrkjarar sum Tove Ditlevsen, Michael Strunge og Henrik Nordbrandt, men eisini bloggarar, sum reindyrka ein essay-form. Tað kunnu vera Erlend Loe og Garrison Keilor, men eisini Jóanes Nielsen, tá hann skrivar tíðargeinar í bløðunum. Elski hansara gløðandi penn.

**ÚTVARP**
'Rót og rútma' er mín yndissending, tí hon er gjørd við hjartablóði. Royni at lurta eftir tíðindasendingunum. Mær dámar best tá útvarpið fer í dýpdina og tekur lurtaran í álvara. Rás2 fangar meg sjálvdan.

**TELEFON**



Eg havi eina Sony W980, sum eg brúki at tosa og sms:a við. Fyri ikki at vera á netinum alla tíðina havi eg sett eitt skott her. Lesi ikki teldupost á telefonini, bara á telduni.

**HVAT VILT TÚ IKKI BRÚKA TÍÐ UPPÁ?**
Líkagyldigheitir og tá verturin gloymir lurtaran. Her er 'Forbrydelsen' fyrst fyri.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Manglandi redaksjonellur greiddleiki, sum til dømis stóra evnið tilflytarar í seinasta Vikuskiftis Sosialini. Hetta mál gekk aftur í fleiri greinum, uttan eina sambindandi vinkling. Í útvarpinum tá redaksjónin velur at brúka Benny Hill ljóðmyndir í tíðindunum, men eisini tá upplesarar ikki fyrireika seg, men hakka seg gjøgnum tekstin. Og ikki minst tá teir upp í saman missa tráðin í ítróttarsendingum í sjónvarpinum.

**HVAT VILT TÚ HAVA MEIRA AV Í MIÐLUNUM?**
Haldi bløðini gera tað tey kunna. Í Kringvarpinum eina livandi mentanarsending, sum hvørja viku vendir sær til brúkaran. Eina fiskivinnusending, ið blæsir lív í alt, sum luktar av fiski. Streymandi dagførdan tónleik við saft og kraft, so eg slapp undan at tendra satelittradio fyri at hoyra Rammstein. Og so kundi eg hugsað mær smáar bitar av føroyskari sjónvarpsfiksjón. Ein minutt um mánaðin. Tólv um árið. Tað hevði eg elskað!